# fáa meiri kjøt á



- Størsti trupulleikin í Suðuroy er manglandi álit og vit koma ikki víðari, fyrrenn vit seta okkum saman at byggja álitið upp ímillum partarnar, segði Dennis Holm, her vm í kjaki við Hilmar Høgenni úr innlendismálaráðnum í miðjuni og Heðin Zachariasen, borgarstjóra í Sunda Kommunu

kunnu seta seg niður at tosa saman. Vágbingar stúra fyri, at verður øll oyggin ein kommuna, rýkur kommunuskrivstovan av bygdini og TB'arar stúra fyri, at verða fótbóltsfeløgini løgd saman, missa tey fótbóltin av Tvøroyri.

- Tí er manglandi álit størsti trupulleikin í Suðuroy og vit koma ikki víðari, fyrrenn vit seta okkum saman at byggja álitið upp ímillum partarnar, segði Dennis Holm.

### Listi við fyrimunum og vansum

Jógvan K. Mørkøre, bygdaráðslimur á Eiði, tók fult undir við hesum. Hann helt, at tað fyrsta,sum var at gera, er at seta fyrimunirnir og vansarnir við samanlegging, svart á hvítt.

- Men tað havi eg ongantíð sæð enn, legði hann afturat.

Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági, helt, at orsøkin til, at ongin hevði sett fyrimunir og vansar upp, kundi vera tann, at tað var so ómetaliga torført at siga frammanundan.

- Eg haldi, at mangan ber ikki til at síggja ávirkanina, fyrrenn aftaná, segði hon.

- Men hon vísti eisini á, at á borgarafundinum høvdu tveir mans við royndum av samanlegging, greitt frá, at teir høvdu bara góðar royndir av at leggja saman.

Talan var um Rodmund Nielsen, sum var borgarstjóri í Runavík og Heðin Zachariasen, borgarstjóri í Sunda Kommunu, sum hildu, at samanlegging í teirra økjum hevði verið ein stórur fyrimunur.

# ingum 14 milliónir um árið

fyri og tyngt av skuld.

- Fyri 10 milliónir hevði borið til at havt eina professionella umsiting í Suðuroy við løgfrøðingum, búskaparfrøðingum, tekniskum starvsfólki o.s.fr.

- Og tá hevði enntá peningur lopið av.

Í hesum sambandi leggur hann afturat aftaná fyri Sosialinum, at vanliga verður sagt, at ein løgfrøðingur, búskaparfrøðingur ella annar akademikari, kostar 500.000 krónur um árið.

So kann ein og hvør hugsa sær, hvørji størv kundi verið sett á stovn fyri ta upphæddina, sum umsitingin kostar í dag.

### 100 milliónir at menna oynna fyri

Tað er ongin loyna, at Jacob Vestergaard er heitur talsmaður fyri at leggja alla Suðuroy í eina kommunu.

- Savnast øll Suðuroy í einari kommunu, kann hon fáa eina sterka umsiting. Men allir suðuroyingar eiga eisini at vera førir fyri at seta seg við sama borð og leggja útbyggingar til rættis á ymsum økjum, bæði mentanarliga, vinnuliga og á ítróttarøkinum.

- Tað er sera umráðandi at allar fíggjarligar kreftirnar í teimum sjey kommununum, verða savnaðar og brúktar til felags besta fyri Suðuroynna sum heild.

Hann heldur, at endamálið er at fáa meiri burturúr tí samlaða fíggjarliga tilfeingi, sum er til taks, so at Suðuroy kann lyftast upp.

- Suðuroy hevur stóra skuld, men tað kann tykjast órættvíst, at summar kommunur hava brúkt nógvan pening til útbyggingar, sum borgarar úr øðrum kommunum njóta gott av, sum ikki betala skatt í teimum kommunum, sum hava gjørt útbyggingarnar.

- Í mínari verð er onki so natúrligt, sum at øll Suðuroy verður savnað í eina kommunu, so at vit standa sum ein maður úteftir, legði hann afturat.

Hann vísti á, at verða allar kommunurnar í Suðuroy lagdar saman, hevur hendan eina kommunan góðar 100 milliónir at arbeiða fyri um árið og at menna oynna við.

- Er ætlanin at byggja mentanarhús, fótbóltsstadion ella annað, byggjast, hevði orka verið til tað í nógv størri mun enn hvør einstøk komma hevur nú.

- Og verður øll oyggin løgd saman, verður skuldin hjá Suðuroyar Kommunu 0,79 álíkning, ella minni enn eina álíkning.

### Størri eindir ein fortreyt

Landsstýrismaðurin í innlendismálum vísti á týdningin at skapa størv í Suðuroy so at fólk við útbúgving høvdu nakað at koma aftur til.

Í dag hava teir suðuroyingar, sum fáa sær útbúgving, lítið og onki at koma aftur til, men hetta er eisini ein spurningur, sum landsstýrið arbeiðir við.

Men hann hevur fyrr nevnt, at skulu fleiri málsøki leggjast frá landinum undir kommunurnar at umsita, er tað ein fortreyt, at øki leggja saman í størri eindir, so at tey verða førar fyri at átaka sær eina økta umsiting og soleiðis, at Suðuroy kann verða umsitin úr Suðuroy og ikki úr Havn, sum nú.



*Kommunurnar í Suðuroy kundu brúkt pengarnar nógv betur, heldur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum*

# Rodmundur vónbrotin av manglandi dirvi

**- Størsta vonbrotið eg hevði sum borgarstjóri í Runavík, er manglandi dirvi hjá landsstýri og Løgtingi at geva kommununum fleiri uppgávur at umsita, segði gamli borgarstjórin í Runavík, Rodmundur Nielsen**



*Tá ið politikarar tosa um at leggja ymisk øki undir kommunurnar at umsita, er tað onki uttan tokutala, staðfesti Rodmund Nielsen gamli borgarstjórin í Runavík, á borgarafundi í Vági í farnu viku*

KOMMUNU-POLITIKKUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er onki uttan tokutala, tá ið politikarar í landsstýrið og Løgtingi hava tosað um at leggja ymisk málsøki undir kommununar at umsita.

Tað staðfesti gamli borgarstjórin í Runavík, Rodmundur Nielsen, á borgarafundi í Vági í farnu viku.

Hann segði, at hann hevði verið í býráðspolitikki í seks ár.

- Størsta vónbrotið eg havi havt í politikki, er manglandi dirvi hjá politikarum í landsstýri og í Løgtingi, at leggja fleiri uppgávur undir kommunurnar at umsita.

Tað hevur mangan verið ført fram, at leggja kommunur saman, skulu tær fáa fleiri uppgávur at umsita.

Men politiskt hevur eisini leingi verið tosað um at leggja fleiri málsøki undir kommunurnar at umsita fyri at menna økini kring landið.

Tosað hevur verið um eldraøkið, fólkaskúlin o.s.fr.

Og Rodmundur Nielsen helt, at høvdu politikarar víst størri dirvi at leggja øki undir kommunurnar, hevði tað skundað undir eina kommunusamanlegging.

- Tá ið vit við Skálafjørð fóru at tosa um samanlegging, sóu vit í hvussu so er fyri okkum, at tað fór at henda nógv meiri á hesum øki, legði hann afturat.

- Tað tók ótrúliga langa tíð at fáa barnaverndarøkið undir kommunurnar, men enn hevur dirvið ikki verið til at leggja fólkaskúlan, eldraøkið undir kommunurnar, eitt nú heimarøkt, o.s.fr. Tað hevur heldur ikki verið dirvið til at leggja musikkskúlaskipanina undir kommunurnar.

- Hví skulu kommunurnar í Suðuroy liggja á knøunum í mentamálaráðnum fyri at fáa tímar til musikkskúlan. Hví skal ein lærari norðaneftir sigla í tveir tímar við Smyrli at undirvísa í tríggjar tímar í harmoniku ella í blokkfloytu í Suðuroy.

- Tað er heilt við síðurnar av.

Rodmund Nielsen helt, at tað var sjálvsagt, at musikkskúlaskipanin varð løgd undir kommunurnar, tí so kundu kanska eini tríggir, fýra musikkskúlalærarar verðið settir í starv í Suðuroy.